# VILLBLÓMUR OG TALU

## Tann nýggja fløgan hjá Arne Würgler gevur mótleysum treysti og fagnar tí dýrabaru løtuni



### Ummæli



**Hanus Kamban**

Uppi á loftinum hjá okkum lá leingi ein gomul barnabók, slitin í lepar av at verða lisin upp í saman umaftur og umaftur. *Ferðin til Tripiti* æt hon, og har varð fortalt um gomul brákað leiku, sum á veg til sælunnar eldorado fáa síni mein ella sár grødd. Tey koma til eina strond, og hinumegin havið sæst oyggin Tripiti, við tornum og glampandi býarljósum. Sama kvøld, liggjandi undir heitum, reinum dýnum, vita tey, at nú eru tey komin *heim.* Henda søgan, í grundini ein paradís-myta, kann eisini sigast soleiðis:

*Der er mørke skyer på himlen*
*Min vej er stejl og fuld av sten*
*Men bløde senge står og venter*
*Nu blir jeg fri for mine men*
*Nu går jeg hjem for at se min mor*
*Hun er der, når jeg kommer frem*
...

Henda tekstin finna vit á fløguni *En Hjertesag*, sum í gjárkvøldið datt inn um mína gátt, brosandi, bjartskygd og respektleys. Fløgunnar skapari er tann danski sangarin og yrkjarin Arne Würgler, sum sæst uttan á húsanum við gittara á økslini, kanska á veg til býin Machen í Norðurtýsklandi at hitta vinmannin og musikaran Nils Tuxen, sum hevur ríkað verkið við tónum frá fimm ymiskum ljóðførum.

Sangurin, eg havi endurgivið part av omanfyri, er ein umyrking av tí kenda amerikanska andaliga fólkasanginum "Wayfaring Stranger", sum m.a. Burl Ives, Joan Baez og Johnny Cash hava sungið. Og tað er undranarvert, at tað ber til at endurgeva ein tekst, sum í grundini er religiøsur, á so blúgvan og óuppgjørdan hátt, at ein og hvør kann gera tekstsins orð til síni:

*Nu går jeg gennem perleporten*
*Vejen frem er pludselig nem*
*Nu går jeg til de kendte egne*
*Nu går jeg til mit kære hjem*

Umsetingin undirstrikar eina av mongum dygdum við hesi útgávu, í hesum føri tað – sum mong hava vitað leingi – at tað musikalska og tematiska klaviaturið hjá sekstiáranna mótmælissangarum og barrikadudandarum er víðkað og ríkað til eisini at fata um tað persónliga og tað tilveruliga. Her gongur sjón fyri søgn, tí á *En Hjertesag* finna vit eggjandi sosialar tekstir, hvassar viðmerkingar, tíðleysar fólkavísur, umframt tekstir, har Danmark verður revsað eins væl og elskað. Eitt serligt pláss á fløguni eigur kærleikssangurin "Du er mit lille orgie", kveiktur av tí eymleika, eitt gamalt fotografi kann vekja:

*Du er mit lille orgie*
*Du sjoveste af børn*
*Indimellem fryser du*
*Som isens hvide bjørn*
*Du er mit lille orgie*
*Min glade nordenvind*
*Dine grågrå øjne gemmer*
*Dit varme vilde sind.*

Føroyar eru ikki nakað Amalfi, vínrunnar spretta ikki í okkara reynum, og gullsand finna vit ikki í okkara áum. Men í hesum døgum síggja vit, at tær smáu, vindbardu villblómurnar, sum kaga fram í andglettin úr svørði ella eyri, eiga sterkari og sjáldsamari litir enn blomstur aðrastaðni. Og júst hetta – tann serliga, føroyska eksotisman - er evnið í "Du er mit lille orgie", sum er ein kvøða til ta føroysku gentu, sum kom at fylgjast við Arna á tilveruferðini til – ja, hví ikki? - Tripiti.

Men á hesi fløgu er sanniliga, og tíbetur, eisini annað enn kærleiki og eymleiki. Tann næstseinasti sangurin á útgávuni er ein rapparatekstur, kveiktur av eini veruligari hending. Tá ið tað danska Kongaskipið í september í fjør skuldi koma til Ærøskøbing, stóð ein unglingi á bryggjuni við einum bannara við áskriftini *Ned med monarkiet* á. Ivaleyst hevur hann hildið, at Danmark – sum prædikar um talufrælsi í muslimskum londum – sjálvt fór at liva upp til egin krøv. Men hesin raski, ungi demokraturin fekk aðra bók at lesa í. Hann bleiv álopin av fýra løgreglumonnum, og

*En pressede et knæ mod det*
*nederste af min ryg*
*En anden trak mine arme op i ryk*
*Med hænder i håndjern gør det*
*virkeligt ondt*
*Men at blive arresteret skal vel*
*ikke være sundt ...*

Tað er at fegnast um, at onkur tekur talufrælsið í álvara, og ikki minst her í Føroyum – har snobbanna fylgi tykist størri nú enn nakrantíð fyrr – er tað vælgerandi at hoyra ein tekst sum "Ytringsfri", har gjørt verður vart við, at tað lekur so tað munar millum teori og praksis.

Men latið okkum venda aftur til Føroya. Arne hevur ferðast nógv henda vegin og hildið konsertir, fyrstu ferð í seinnu helvt av sjeytiárunum saman við sínum vinmanni og medsangara Benny Holst. Hann hevur eisini hildið skeið fyri føroyskum sangarum, sangskrivarum og tónleikarum. Ikki minst áhugavert við hansara nýggju fløgu er, at hann hevur valt at geva Martini Joensen eitt heiðurspláss á henni. Hetta er ikki at undrast á, tí Martin Joensen er ein av okkara mest áhugaverdu yrkjarum og lagasmiðum. Yrkingin, Arne hevur valt, er tann meditativt-sorgblíða "Jeg vil gemme dig" (á føroyskum "Lat meg goyma teg", av fløgu frá 2006 við sama heiti):

*Giv mig penne, jeg vil tegne*
*Lad mig få det hele med*
*Lad mig gemme dine skygger*
*Før du ta´r afsted*
*Lokke lyset fra dit hår*
*Fange øjnes drømmedyb ...*

Ein ikki ókend siðvenja í donskum skaldskapi, sum eitt nú bæði Jeppe Aakjær, Piet Hein og Halfdan Rasmussen umboða, er kynstrið at klæða álvarsemið í eitt lætt, fyndugt og stuttligt plagg, uttan at tað fyri tað missir nakað av síni vekt. At Arne dugir henda kunstin - antipatetiskan patos, kunnu vit kanska rópa tað – vísir hann í tí originala "Lille Marie flyv op", sum á sín hátt er ein viðmerking til tað nýggja stættastríðið, hvørs avleiðingar í fyrstu syftu lond sum Ísland og USA hava smakkað, og sum vísti sítt óhugnaliga og náðileysa andlit í nett somu løtu, sum okkara framskygdi javnaðaroddviti Jóannes Eidesgaard boðaði frá, at nú var tað tikið av dagsskránni:

Sosialurin